# 1 Røðan hjá forsætisráðharranum til fólkatingssetanina 1. oktober 2024

Tað talaða orðið er galdandi

*Talaða orðið er galdandi*
Eg fari at byrja mína røðu í dag við einari søgu. Henrik Pontóppidan skrivaði hana fyri 139 árum síðani.
Søgan eitur "Naadsensbrød."
Hon snýr seg um eina fátæka, gamla konu. Stine Bødkers eitur hon.
Alt lívið hevur Stine stríðst og strevast í róta- og eplaveltunum, men nú hevur hon meiðslað hondina í einari stórtreskingarmaskinu. Arbeiðir ikki longur. Og hevur - við orðum Pontoppidans - *"tyet til Fattigfolks store Trøster, til Brændevinens Barmhjærtighed."*
Í stuttum: Tað gongur sera illa hjá Stine.
Hvussu reagerar tátíðar samfelagið uppá tað?
Jú, avgjørt verður, at Stine skal í fátækrahúsið - ella á mannamáli: "til kassan."

Kassen er ein arbeiðsstovnur við stevi og stevnu. Her verða fátækralimirnir vaktir klokkan fýra um morgunin. Veva sevmottur og binda kurvar allan dagin.
Ikki løgið, at Stine ikki vil tað. Men hon má fara.
Forvitnir grannar tyrpast inn í smølu gøtuna, har hon býr.
Boð verða send eftir sóknarfútanum. Gamla konan verður bundin á hond og fót. Og førd burtur, meðan bygdarbørn rópa og floyta.
Tað er hjartaskerandi.
Tað er óvirðiligt.
Hví taki eg hesa søguna upp?
Eg geri tað av tveimum orsøkum.
Tí okkara danska søga varpar eitt - onkuntíð brutalt - ljós á okkara egnu samtíð.
Og tí at vit í bókmentum hava ein sannan dýrgrip.
Bøkurnar geva okkum innlit. Fatan. Og tað empati, sum eitt samfelag og menniskju ikki kunnu vera fyri uttan.
Høvdu vit kent til fátækradømið og neyðina í gamla Danmark, um tað ikki var fyri Pelle Erobreren?
Skilt kvinnulív uttan Tove Ditlevsen?
Og skuggasíðuna í nútíðar Danmark uttan Thomas Korsgaard og Morten Pape?
Langt inn í 1900-talið vórðu fólk sum Stine rópt "óverdig tørvandi". Drykkfýsin. Dovin.
Hildið varð, at tey vóru ein byrða fyri samfelagið, og at tey bara av teirri orsøk vóru minni verd enn onnur.
Tey sluppu ikki at atkvøða. Fingu ikki húsrúm. Og sluppu ikki at giftast uttan at biðja um loyvi.
Soleiðis er sjálvandi ikki longur.

Hjálp er ikki olmussa.  At hjálpa og fáa hjálp er blivin ein partur av, hvørji vit eru - sum danir. Men eru vit har, vit vilja vera í virðing fyri øðrum menniskjum?
Lofta vit hvørjum øðrum?  Ordiliga? Og skilja vit, hvussu vit seta okkum í støðuna hjá teimum mest viðbreknu?
Ella hevur pendulið fingið loyvi at sveiggja hinvegin?
Av tí at vælferðarsamfelagið er til, kunnu vit kanska hugsa, at onnur fara at taka sær av umsorganini.
Í dag vil eg tosa um tykkum, sum sjáldan hava eitt heim. Sum ikki hava eitt arbeiði.  Men sum hava eina misnýtslu og stríðast við likamligar og serliga sálarligar sjúkur.
Tykkum, sum kanska tykjast ræðandi fyri summi, tá tit dingla oman eftir gøtuni við kenning saman við einum leysum hundi.
Tykkum, har rúsevnini hava tikið yvir.
Tykkum, sum vit onnur skunda okkum framvið, tí vit ikki vita, hvat vit skulu siga ella gera.
Kanska hava vit sæð teg á bonkinum saman við hinum ella kanska hava vit slett ikki varnast teg, tí tú ert einsamøll ella einsamallur har heima.  Við ov nógvum burturkasti. Ov nógvum uppvaski.  Og rullugardinurnar eru afturlatnar, tí tað kanska er einasta loysnin.

Eg vil tosa um tykkum, sum sjáldan fáa stórvegis uppmerksemi í fólkatingssetanini. Men hana skulu tit fáa í dag.
* * *
Vit hava lagt okkara samfelag til rættis eftir stóra meirilutanum.  Sjálvandi hava vit tað.
Men við tí fylgir eisini ein skylda mótvegis einum minniluta.
Um tú livir eitt “skeivt” lív. Tá er trupult at passa inn í samfelagsins fýrakantaða kassa.

Lat meg koma við einum dømi.
Nógv tey flestu heimleysu vilja gjarna hava egnan bústað.  Og tá tey fáa tað, er tað fyri nógv ein kensla av tryggleika og eitt týdningarmikið framstig.  Men ikki fyri øll.
Hus Forbi – blaðið hjá teimum heimleysu, og eitt framúr blað av sínum slag – hevði í august eina samrøðu við 43 ára gamla Henrik.
Í næstan trý ár búði hann á vistarheimi, har hann fekk hjálp til at halda avtalur.  Bygdi upp álit á starvsfólkini.  Og fekk tríggjar fastar máltíðir um dagin.
Tað gekk so mikið væl, at hann var farin í rúsviðgerð.
Fyri stuttum flutti Henrik inn í sítt egna heim.
Hann fekk sítt egna, men hann misti okkurt annað: Fólkini, sum hann var vanur við at vera saman við.
Sum hann sjálvur sigur: “So eg sat bara har á sofuni og hugdi at vegginum og hugsaði; hvat fanin geri eg her?”
Sitat endað.
Og so fór Henrik oman í handilin og keypti øl.
Fyri tey flestu er tað púra grundleggjandi at hava arbeiði og heim, men fyri summi kann tað eisini vera ov nógv.

FOLKETINGET

Har eru støður, har vit mugu lata viðbrekin fólk liva sítt egna lív, men tað merkir ikki, at vit mugu lata tey detta niður ímillum. Vit mugu bara ansa eftir ikki at hava ov fastar ambitiónir vegna onnur.
Lat meg koma við enn einum dømi:
Nógv tey flestu fólkini við rúsevnismisnýtslu vilja steðga misnýtsluni, men tað er ikki altíð har, tey eru.
Beint nú kann trupulleikin kanska vera at taka rúsevni á gøtuni. Við eitt portur. Í einari trappu-uppgongd.
At skjóta eina skitna nál inn í eitt gamalt sár. Við smittuvanda og tí, ið verri er.
Sett fram. Fyri eyguni á øðrum. Fyri dómin frá øðrum.
Á Halmtorvet í Keypmannahavn er "Stofindtagelsesrummet H17".
Her kunnu tey mest viðbreknu taka rúsevni í tryggum kørmum. Reinar sproytur.
Heilsustarvsfólk, sum eru til reiðar. Uttan fordøming. Við virðing.
Hatta er kanska tað, sum tørvur er á her og nú. Ikki ein ætlan um niðurtrapping og viðgerð. Ikki enn.
Í dag taka nógv væl virkandi ung fólk rúsevni. Tað er vandamikið. Kann hava stórar avleiðingar. Og sølufólkini mugu revsast hart.
Men fyri tey, sum eru ringast fyri, er søgan ein onnur.
Her eru rúsevnini eitt slag av sjálvmedisinering, soleiðis at eitt ótolandi lív kann tolast og yvirlivast í tíðarskeiðum.
Í dag eru fimm rúm til inntøku av rúsevnum í Danmark.
Eitt í Århus. Eitt í Odense. Eitt í Vejle. Tvey í Keypmannahavn.
Vit vilja gjarna seta pening av til fleiri.
Til at víðka um verandi rúsevnisrúm. Við longri upplatingartíðum. Fleiri plássum. Og at skapa nýggjar í øðrum donskum býum.
Vit mugu geva fleiri fólkum eitt tryggari og virðiligari lív. Burtur frá trappusteinum og forvitnum eygum.
* * *
Vit mugu góðtaka eitt skeivt lív, men ongantíð góðtaka, at tað gerst eitt óvirðiligt lív.
Stjórnin vil gera tingini øðrvísi. Vit taka støði í teimum, tit eru.
Vit vilja reka ein virðiligan sosialpolitikk.
Hvat merkir hetta? Hvat merkir – tign?
Fleiri ting. Fyribyrging er tað týdningarmesta. Og hjálp til at fáa eitt arbeiði ella at byrja í skúla er sjálvandi málið. Fyri tey flestu.
Men vit hava eisini ein hóp av sera viðbreknum menniskjum, har lívið er so hart, og har ósigrarnir eru so nógvir, at vit mugu tora at seta umsorgan og kærleika sum tað týdningarmesta.
Tey mest viðbreknu fólkini í Danmark eru fá, men kortini ov nógv.
Meirilutin eru menn, og tíverri gerast teir sjáldan serliga gamlir.
Nógv eru á fyritíðarpensjón ella pengahjálp.
Nógv hava skuld til tað almenna.
Og helvtin hevur fingið dóm innan seinastu fimm árini. Ofta fyri stuldur. Ella fyri at hava kokain í lummanum.

Okkara vælferðarsamfelag byggir á skyldu og rætt, í hasi raðfylgjuni, men fyri júst hesi fólkini mugu vit gera eitt undantak - seta rætt fram um skyldu.
Geva teimum ein steðg og eitt stað, har pláss er fyri at gera tingini øðrvísi.
Færri krøv og revsingar.
Kanska eina striku á skuldina?
Tá tú býrt á gøtuni, hevur tú ongan møguleika at gjalda tína skuld til tað almenna, sum lættliga kann koma upp á eina fjórðings millión krónur.
Og vit mugu og skulu hava meira fyrilit við tí heimleysa ella persóninum við rúsdrekkamisnýtslu, sum skal sita dóm.
Í fongslinum enda tey ofta niðast í hierarkinum.
Verða útnyttað av teimum sterku fangunum.
Trýst til at keypa og selja rúsevni.
Og tá tey verða leyslatin.
So er skuldin vaksin.
Tey eru framvegis bundin.
Men hava ongastaðni at fara.
Ein kvinna lýsti tíðina eftir leyslatingina sum eitt frítt fall.
Vit kunnu ikki lata fólk detta niðurímillum.
Hvussu kunnu vit forða fyri, at teir veikastu fangarnir verða útnyttaðir av teimum sterkastu?  Skulu tey mest viðbreknu kunna sita dómin á annan hátt enn í dag?
Í einum staði við rúsevnisviðgerum og heilsustarvsfólkum.  Við meira hjálp og stuðli. Og uttan bandalimir, sum ikki hava virðing fyri einum.
Men vegurin fram er fullur av torførum tvístøðum.
Um vit gera serligar reglur. Hvør heilt serligur bólkur skal so vera umfataður av teimum? Hvør skal ikki?
Tað er ikki lætt. Tað verður als ikki lætt.
Eg kundi ikki droymt um at tala fyri einum samfelag uttan avleiðingar.  Tvørturímóti. Tí tú hevur sjálvandi altíð ábyrgd av tínum gerðum.
Í stjórnini fara vit at gera alt fyri at fáa enda á harðskapinum. Skjótarínum hjá bandunum í gøtunum.
Vit eru í ferð við at fyrireika eina nýskipan við hægri revsing fyri brotsverk, har fólk verða sett í vanda.  Aftur.
Men tá tað snýr seg um tey mest viðbreknu, vilja vit loyva okkum at hugsa nýtt.
* * *
Kanska eru tit ein sosialráðgevi ella tveir, sum lurta við í dag.  Kanska eisini ein sjúkrarøktarfrøðingur og eitt løgreglufólk. Og onnur, sum arbeiða við teimum sosialt sperdu í samfelagnum.
Eg veit, at sera nógv tykkara – lukkutíð – gera eitt stórt arbeiði hóast tær reglur og skipanir, sum vit hava gjørt.
Við tykkum vil eg siga:  Vit hava brúk fyri tykkara vitan, áræði og hjálp.
Tí eg haldi eisini – eftir at hava verið djúpt inni í sosialpolitikki alt mítt lív – at vit nú eru á einum vegamóti.

Vit eru von við at vilja loysa trupulleikarnar við fleiri málsviðgerum. Fleiri tvørfakligum átøkum. Fleiri tilgongdum. Fleiri krøvum til kommunurnar. Alt í bestu meining.
Men á henda hátt oysa vit fleiri átøk og allar møguligar tilgongdir á okkara mest viðbreknu. Ein tilgongd, sum kanska als ikki samsvarar við, hvar tey eru.
Tíðin er komin til, at samfelagsins breiðu herðar bera meira, soleiðis at tær smølu herðarnar hjá teimum viðbreknu skulu bera minni.
* * *
Her í Fólkatinginum hava vit longu gjørt nógv.
Eina heimloysisnýskipan fyri at fáa enda á langtíðar heimloysi.
"Barnanna lóg", har vit styrkja rættindini hjá teimum mest útsettu børnunum.
Betri átøk fyri fólk við álvarsligum sálarligum trupulleikum – langt frá nóg mikið, tað veit eg væl – men nú hava vit fyri fyrstu ferð eina 10 ára ætlan fyri psykiatriina.
Vit hava loksins innført ordiliga viðgerð fyri borgarar við dupultum diagnosum.
Og fyri stuttum avgjørdu vit her á Fólkatingi at gera tað sosiala fríkortið varandi.
Týdningarmikil stig. Nú mugu vit halda áfram.
Vit mugu vera eitt Danmark, har vit trúgva uppá hvønn annan. Síggja menniskjað. Skapa virðiligar møguleikar. Reisa tey, sum falla.
Tí í veruleikanum eru "hini" ikki til.
Hvørji skuldu tey verið?
Tey eru fólk sum tú og eg. Tey eru vit sjálvi.
* * *
Tað er okkara leiðregla fyri tey stóru politisku uppskotini, ið vit sum stjórn leggja fram í nýggju tingsetuni. At vit gera politikk fyri tey, sum tað snýr seg um.
Hvussu er tað at búgva í Suðursælandi ella í Vendsyssel og ikki hava ein fastan lækna?
Ja, tað er ikki serliga trygt.
Og hvussu er tað at hava tað, sum vit í gomlum døgum kallaðu roykjaralungu – nú KOL?
At nóg illa vera før og førur at anda? Og samstundis skula finna runt í einari fløkjaligari heilsuskipan?
Tað er ikki serliga trygt.
Tað er heldur ikki rættvíst.
Og tað er als ikki tann fría og javna atgongdin til heilsu, sum vit ynskja.
Tí er ein læknanýskipan tað mest týðandi í heilsunýskipanini, sum eg vóni skjótt verður klár aftaná samráðingar her í Fólkatinginum.
Fleiri praktiserandi læknar mugu vera har, sum fólk eru mest sjúk. Tað sama mugu serlæknarnir vera. Og tey smærri sjúkrahúsini, sum eru spjadd kring landið, mugu hava nóg mikið av starvsfólkum fyri at kunna bjóða ta viðgerð, sum íbúgvunum tørvar.
Við íblástri frá krabbameinspakkanum fara vit nú at innføra kronikarapakkar.
Vit byrja við KOL. Halda áfram við diabetes. Og øðrum kroniskum sjúkum.
Eg veit frá míni egnu familju, hvussu nógva trygd krabbameinspakkarnir veita í eini ótryggari støðu. Tú veitst, hvat skal gerast. Hvat tú kanst líta á. Bæði sum sjúklingur og avvarðandi.
Fólk við kroniskum sjúkum hava eisini tørv á hesi trygd og vissu.
* * *

Politikkur má lyfta fólk upp.
Tað er eisini galdandi fyri tey, sum ikki hava arbeiði.
Í Danmark hava vit eina av dýrastu arbeiðsskipanunum í heiminum. Hvørt ár brúka vit meira enn 11 milliardir krónur til tað.
Sum árini eru liðin, er tað blivið til ov nógva skipan.
Sjúkir borgarar eru ikki viðfarnir á rættan hátt.
Nógv fólk kenna seg sum eina kastibløku í skipanini.
Og viðbrekin fólk verða boðin inn til samrøður og tilboð, sum eru langt frá gerandisdegnum hjá teimum.
Samstundis hava reglur og krøv um skjalfesting rúgvað seg upp.
Nærum 2,4 milliónir samrøður verða gjørdar á arbeiðsmiðstøðunum (jobcenter) um árið.

Málsviðgerarnir. Ja, teir gera í grundini bara sítt arbeiði og fylgja reglunum, vit hava samtykt. Men hetta merkir, at fyri hvørja samrøðu við ein borgara í ein hálvan tíma, brúkar málsviðgerin samsvarandi ein hálvan tíma at skráseta og skjalfesta.
Stjórnin vil lata arbeiðsmiðstøðirnar aftur. Ein nýggj byrjan, har kommunurnar fáa frælsi at skipa síni arbeiðsviðurskifti.
Vit hava eitt sera lágt arbeiðsloysi í Danmark.
Fólk flest, sum missa arbeiðið, finna skjótt eitt nýtt. Onnur hava tørv á upplæring. Og so eru tað tey viðbreknu arbeiðsleysu, sum hava tørv á serligari hjálp.
Vit skjóta upp at skera eina hálva millión samrøður burtur. Taka burtur revsingar fyri borgarar, sum stríðast við aðrar álvarsligar trupulleikar í gerandisdegnum enn arbeiðsloysi, men samstundis vænta vit, at øll gera sítt fyri at hjálpa til.
Tí verður arbeiðsskylda nú innførd, serliga fyri tær mongu kvinnurnar við ikki-vesturlendskari bakgrund, sum enn ikki eru partur av arbeiðsmarknaðinum.
Vit eru í gongd við at koyra eldrarumsorgan úr strangum tíðarætlanum.
Vit hava avgjørt at loysa fólkaskúlan frá meginreglum.
Nú stendur arbeiðsskipanin fyri tørn.
Færri samrøður, færri revsitiltøk.
Meira menniskjaligt.
* * *
Eisini tá vit tosa um útbúgving, mugu vit seta okkum í støðuna hjá øðrum.

Hvussu er tað at vera 15-16 ár?

Roynið og hugsið aftur.
Summarferia. Liðug við skúlan. Gleðin er í kroppinum. Kanska eisini ein óvissa. Hvat fer nú at henda?
Tú veitst helst ikki, hvat tú vilt vera sum vaksin. Ikki enn. Hvat gert tú so?
Sjálvandi dámar nógvum fólki betur at fylgja vinum sínum á eini leið, har tær ikki nýtist at læsa teg langt inn í framtíðina, og til eitt stað, sum ikki er ov langt burturi við einum sterkum felagsskapi.

Tí er miðnám eyðsýnda valið fyri nógv ung. Tí miðnámsskúlarnir bjóða tað, sum flest ung leita eftir. Eitt livandi og hugvekjandi ungdómsumhvørvi.
Men hugsa tær, um miðnámsskúlin og allir møguleikarnir kundu blivið ein leið fyri øll okkara ungu fólk – eisini tey, sum *ikki* leita eftir tí bókliga.
Vit vilja tryggja, at øll ung eftir barnaskúlan fáa eitt veruligt tilboð um eina *ungdóms*útbúgving. Við áherðslu á *ungdóm.* Hetta er høvuðshugskotið í uppskotinum, sum stjórnin fer at leggja fram í næstu viku.
So leingi eg minnist, hava vit gjørt umvælingar í eini útbúgvingarskipan, sum ikki heilt passar teimum, ið eru ung í dag. Nú er tíðin komin at endurhugsa alt umaftur og enn størri.
Í framtíðini mugu vit bjóða øllum ungum at ganga í miðnámsskúla, tí tað er tað, tey flestu ungu ynskja. Eg haldi, vit skulu lurta eftir tí. Men tað má vera ein øðrvísi miðnámsskúli enn í dag.
Tað verða tríggjar leiðir at velja ímillum.
Ein handilsskúli. Fyri tey, sum vilja læra um búskap, mál og íverksetan.
Ein almennur studentaskúli. Fyri tey, sum kunnu og vilja hava tað akademiska og ástøðiliga.
Og sum nakað heilt nýtt: Ein yrkis- og professiónsrættaður miðnámsskúli.
Tað er fyri teg, sum vilt arbeiða saman við fólki í okkara vælferð. Tað kann vera, at tú vilt vera sjúkrarøktarfrøðingur ella løgreglumaður. Ella vilt tú arbeiða við grøna orkuskiftinum sum maskinmeistari ella timburmaður.
Útbúgvingin er eisini fyri teg, sum kanska hevur áhuga í eini yrkisútbúgving, men sum ynskir at halda hurðarnar opnar fyri øðrum møguleikum. Vera eitt sindur longur í einum skúlaumhvørvi saman við øðrum ungum fólkum. Og ikki er til reiðar at sita í einum húsvogni sum 15-16 ára gamal ella gomul.
Líka mikið hvønn miðnámsskúla tú velur, fært tú eina húgvu á, tá tú hevur klárað endaligu próvtøkurnar. Og líka mikið hvønn miðnámsskúla tú velur, hevur tú møguleika at nema tær útbúgving aftaná.
* * *
Tað eru nakrar mýtur um útbúgvingarpolitikkin hjá stjórnini, sum eg fari at brúka hendan møguleikan til at avlíva. Summi fólk skapa eina fatan av, at hendan stjórnin niðurraðfestir útbúgving.
Sjálvandi er hetta ikki satt. Tvørturímóti. Samanlagt hevur stjórnin hækkað játtanina til undirvísing og útbúgving við umleið 5 milliardum krónum fram til 2030, tá hugt verður eftir samtyktum og komandi tiltøkum á økinum.
Okkara uppskot um eina nýggja ungdómsútbúgving fer at kosta meira enn tvær milliardir krónur um árið. Til praktiska, spennandi og góða undirvísing. Í ordiligum flokshølum. Við dugnaligum lærarum.
Og samstundis hava vit býtt tilfeingið meira javnt. Givið meira pening til yrkisútbúgvingarnar.
Tað var upp á tíðina.

Ein onnur myta. Eg havi hoyrt ta grundgeving, at tá vit vilja broyta ungdómsútbúgvingarnar, so at tær veruliga hóska betur til tey ungu, býta vit ungdómin í eitt A og B lið.
Er tað ikki snobbarí hjá teimum vaksnu, sum kemur fram her?
Í alt ov nógv ár hevur prestisja fylgt við akademiskari útbúgving.
Tað er júst tað, vit vilja rætta uppá. Við sterkum ungdómsútbúgvingum – ja, A-liðum fyri øll okkara ungu fólk – eisini tey við øðrum áhugamálum enn tí akademiska.
Tað er upp á tíðina.
Um tíggju ár verða nærum 10 prosent færri ung millum 15 og 18 ár. Í bygdarkommununum verður afturgongdin væntað at verða enn størri.
Um vit einki gera, verða tómir stólar í lokala miðnámsskúlanum og lokala yrkisskúlanum.
Hetta kann vera byrjanin upp á eina ónda ringrás í teimum smærru býunum.
Færri næmingar. Minni peningur til skúlan. Meira enn trupult at draga lærarar at skúlunum. Í ringasta føri afturlatingar.
Nú koma vit við einum nýggjum yrkis- og professiónsrættaðum miðnámsskúla, ið summastaðni verður staðsettur á teimum yrkisskúlunum, vit kenna í dag, men sum aðrastaðni verður settur saman við hinum ungdómsútbúgvingunum.
So tað verður eitt fakliga sterkt umhvørvi – eisini fyri okkara ungu uttan fyri stóru býirnar – heldur enn at ungdómsútbúgvingarnar mugu lata aftur.
Samstundis geva vit 17 ára gomlum við koyrikorti møguleika at koyra bil uttan fylgjara ávísar tíðir á degnum, og vit seta inn ein flutningsfrádrátt fyri lesandi og næmingar í 25 útjaðarkommunum.
Tú skalt kunna liva eitt gott lív í øllum Danmark.
Tað skalt tú kunna sum ungur. Sum eldri. Og tá børn koma inn í myndina.
* * *
At fáa børn er eitt tað týdningarmesta, sum er.
Soleiðis er tað í øllum førum fyri nógv okkara.
Ynskið um at geva lívið víðari. Tey sera stóru eyguni. Í einum enn størri heimi. Og hey, var hatta eitt smíl, eg sá?
Knappliga er eitt lítið menniskja nógv týdningarmeiri enn tú.
Tað er stórt.
Kortini fáa vit færri børn í Danmark.
Eitt dømi: Um gongdin heldur fram, sum hon er nú, við sama miðal livialdri og gitnaði sum í dag, undantikið inn- og útflyting, so er vandi fyri, at fólkatalið í Danmark minkar til 2,5 milliónir íbúgvar í ár 2100.
Tað svarar til, at Sæland er manntómt, og hóast tað helst eru nøkur, sum fara at hugsa, at so sluppu vit av við kjøpinhavnararnar, er tað ringt at ímynda sær eitt Danmark við minni enn helvtini so nógvum fólkum.
Lat meg gera tað greitt: Eg vil ikki blanda meg uppí, hvussu tú fært børn, ella hvussu nógv tú fært. Sjálvandi ikki. Tað er púra upp til hvønn einstakan. Men eg haldi, at tað er syrgiligt, um færri fólk fáa tey børnini, tey ynskja sær, og um færri fólk vilja hava børn.
Bara fyri at seta tingini í perspektiv.

Fyri hundrað árum síðani í ár – í 1924 – ferðaðist Thit Jensen land og ríki runt við fyrilestri sínum "Sjálvboðin móðurskapur".
Tá vóru kvinnur slitnar av nógvum, óynsktum barnsburðum. Thit Jensen var sjálv eitt av 12 børnum og talskvinna fyri gitnaðarfyribyrging og fosturtøku.
Tað var ein týdningarmikil kvinnubardagi, sum vit halda fram við nú. Fyri fyrstu ferð í 50 ár verður rætturin hjá gentum og kvinnum til fosturtøku víðkaður.
Tá kvinnurættindi aðrastaðni í heiminum verða skerd, fara vit hin vegin. Tí eri eg errin av.
Vit standa á herðunum á øðrum, og tað er ein felagsnevnari frá tá til í dag: At vit sjálv vilja gera av, hvussu familja okkara skal síggja út.
Nógv børn. Fá børn. Eingi børn.
Um lívfrøðin forðar, hava vit tørv á betri gitnaðarviðgerð.
Gransking hevur vanliga hugt at gitnaðarførinum hjá kvinnum – hóast orsøkin ofta liggur hjá monnum. Hetta má rættast.
Og um tað er skipanin í samfelagnum, sum forðar ynskinum eftir børnum, so mugu vit eisini kunna kjakast um tað.
Tað kann vera stressandi at skula klára at gera alt innan nøkur fá ár. Gera sína útbúgving lidna. Fáa sítt fyrsta veruliga arbeiði. At finna kærleikan. Og stovna eina familju.
Men vit mugu viðganga, at loysnirnar helst eru torførari enn so.
Bert eitt dømi: Í Svøríki kunnu foreldur vera heima við einum sjúkum barni í tilsamans 120 dagar um árið, og tey hava rætt til at arbeiða parttíð, inntil barnið verður 8 ár.
Tó hevur Svøríki lægri gitnaðartal enn Danmark, og í fjør var lægsta talið av børnum fødd í Svøríki í 20 ár.
Vit mugu læra meira um, hvat riggar – sjálvandi við virðing fyri tí, at í Danmark eru tað partarnir í vinnulívinum, sum samráðast um lønir og arbeiðstreytir – og vit vilja síggja alt í einum samanhangi.
Fleksibilitet fyri familjur. Góðska og karmar fyri tilboðini, sum vit geva teimum yngstu børnunum. Og eftirløn.
Eftirløn og Arne- og seniorpensiónin. Ja, hetta er nakað, sum vit ofta hava verið ósamd um her í Fólkatinginum. Soleiðis hevur tað verið í nógv ár. Samstundis er tað nakað, sum veruliga upptekur nógvar danskar.
Við vælferðaravtaluni í 2006 var ein breiður meiriluti samdur um, at tað í grundini er ein góð meginregla, at vit arbeiða longur, eins og vit eisini liva longur, og at broytingar við eftirlønsaldrinum skulu kunngerast í góðari tíð, so at danir vita, hvat teir kunnu fyrihalda seg til.
Tí fara vit næsta ár her í Fólkatinginum at atkvøða um at hækka eftirlønsaldurin til 70 ár frá 2040 – tað er um 15 ár.
Vælferðaravtalan hevur verið – og er – alneyðug fyri at vit í Danmark hava ein sunnan, almennan fíggjarpolitikk. Sjálvandi mugu vit eisini hava tað í framtíðini.
Serliga tí vit eisini standa fyri stórum íløgum. M.a. í sambandi við verju og trygd og grøna orkuskiftið.
Men vælferðaravtalan er skjótt 20 ára gomul, og tá eftirlønaraldurin fer upp í 70 ár, er tað natúrligt at hyggja at, um ein onnur skipan skal vera eftir tað.

Ein broyting í vælferðaravtaluni hevur stórar avleiðingar fyri einstaklingin og fyri tjóðarbúskapin.
Tí má tað gerast við virðing fyri einstaklinginum, og tað má vera væl fyrireikað. Stjórnin er nú í gongd við at gera tað.
* * *
Vit skulu kunna liva eitt gott lív. Og vit skulu kunna gera tað í einum Danmark, sum gerst grønari og grønari.
Beint fyri summarið gjørdu vit grønu trípartaavtaluna um størstu broytingina av okkara landslagi í nýggjari tíð.
Kanst tú ímynda tær tað?
Fyrst er tað opinekra. So spretta gras og urtir upp. Eftir nøkur ár eitt træ. Og fyri komandi ættarlið, ein veruligur skógur.
Minni køvievni. Minni $CO_2$.
Reinari vatn.
Meira lív.
Vit seta inn ein veðurlagsskatt í landbúnaðin sum fyrsta land í heiminum.
Og stuðla einari nýmótans og sterkari danskari mat- og landbúnaðarframleiðslu.
Sambært Danmarks Naturfredningsforening er grøna avtalan "søgulig".
Sambært Landbrug og Fødevarer er tað eisini – "søguligt".
So er tað helst nakað um tað.
Samráðingarnar vóru ikki lættar. Eg kann eins væl siga tað, sum tað er. Og lat meg deila eina søgu úr samráðingarrúminum.
Sum mær er sagt, hendi tað: At júst tá øll vóru vís í, at nú høvdu vit eina semju, reisti formaðurin fyri bóndurnar, Søren Søndergaard, seg.
Hann segði, at hann hevði gloymt okkurt. Hugdi runt í rúminum. Og sá, at hini hugsaðu: "á nei, nú kemur meira".
Eg haldi, at nógv lætnaðu, tá seinastu krøvini hjá Søren vístu seg at vera mild.
Hann bjóðaði øllum til heystarveitslu á familjugarðinum Baldershave.
Og tí hittist ein bólkur síðst í august.
Umboð fyri landbúnaðin. Fakfelagsrørsluna. Arbeiðsgevarar. Grønir felagsskapir. Eins væl og politikarar.
Á einum garði nær við Billund. Hálvan vegin millum Lindeballe og Førstballe.
At hátíðarhalda, at ársins heysting var liðug og eina grøna trípartasemju, sum kravdi meira enn vanligan vilja frá øllum, sum luttóku.
Hvat annað stað í heiminum enn beint her í Danmark, sært tú so ymisk áhugamál sita við sama borð?
Vitandi at tað léttasta helst hevði verið at farið upp og síðani út úr rúminum, tá trupulleikar komu.
Grøna trípartaavtalan er Danmark, tá tað er best.
Eg haldi, hetta má vera tann sterkasti ættarliðssáttmálin, sum er gjørdur í mínum næstan 25 árum her í Fólkatinginum.
Nógv høvdu annars sagt, at tað ongantíð fór at gerast veruleiki.
At vit ongantíð fóru at blíva samd í stjórnini.

Tað blivu vit.
At landbúnaðurin ikki vildi taka ábyrgd av náttúruni.
Tað vildu tey.
At náttúrufelagsskapirnir ikki vildu taka ábyrgd av arbeiðsplássunum.
Tað gjørdu tey.
Tí okkurt var týdningarmiklari enn vit sjálvi.
Tí at firðirnir og drekkivatnið í Danmark eru týdningarmeiri.
Tí at okkara børn og barnabørn framvegis skulu kunna syngja við til okkara dansku sangir um geykin, storkin og náttargalan – og kunna finna teir í sínum egna landi.
At tað longu nú eru flokkar, sum ikki vilja hjálpa til at gera grønu semjuna til veruleika, er mær ein gáta.
Takk til allar flokkar, sum taka ábyrgd, og takk til teir mongu, mongu danskarnar, sum berjast fyri okkara náttúru.
Við tí, sum vit gera av her í Fólkatinginum, og við øllum teimum átøkum, sum verða gjørd kring alt landið, skal lív aftur kom í okkara firðir og sjógv.
* * *
Vit menniskju eru partur av náttúruni. Skógurin og djórini, luftin og vatnið – eru ikki nakað uttanfyri okkum, men heldur grundarlagið fyri alla okkara tilveru.
Náttúran er eisini ein máttmikil megi, og hevur altíð verið tað.
Í november 1872 vórðu m.a. Sæland, Lolland og Falster rakt av eini stormflóð.
Oyggjar hvurvu. Byrgingar vóru brotnar. Fólk og húsdjór fórust.
Jarnbreytin var undir í vatni og telegrafurin blástur umkoll, so tað var torført at biðja um hjálp frá restini av landinum. Tað tók tíð, áðrenn onnur skiltu, hvussu ringt tað var.
Meira enn hundrað ár seinni rakti ein ódn alt Danmark.
Á Rømø vórðu hvirlurnar máldar til 51 metrar um sekundið, áðrenn vindmátarin blásti umkoll. Ódnin var ein tann mest týnandi í okkara landi nakrantíð.
Eg haldi, at nógv av okkum minnast, hvar vit vóru hin 3. desember 1999.
Ikki minst øll tit, sum høvdu nógv at gera um dagarnar og næturnar við at hjálpa borgarum og rudda upp eftir oyðileggingina: løgregla, brandmenn, Falck-bjargarar, herskyldig, sjálvboðin.
Í 1872 hjálptu grannar neyðstøddum. Ella máttu tey klára seg sjálvi, og lagnan mátti ráða.
Tíbetur høvdu vit í 1999 eitt heilt annað samfelag og víðkaða tilbúgving.
Men hava vit eisini eina betri tilbúgving í 2024 enn í 1999?
Tað eiga vit at raðfesta at fáa. Tí heimurin er broyttur.
Hygg bara at seinastu árunum:
Krίggj í Evropa. Ein heimsfarsótt. Ógvusligt veður. Beint nú m.a. í Vejle.
Ein økt hybrid hóttan móti Danmark.
Nútíðarsamfelagið er viðbrekið.
Vandarnir eru vorðnir fleiri og sera ymiskir.
Tá koronan kom, høvdu vit hvørki koppsetingar ella maskur til at verja gomul og sjúk.
Tá kríggið rakti, hevði Evropa avdubbað, meðan russararnir høvdu bygt upp herin.
Lat okkum ikki gerast bilsin aftur.
Tað er vanligt skynsemi at vera til reiðar at hjálpa sær sjálvum og hvørjum øðrum.

Sjálvandi setur tað tankar í gongd. Tá tú hevur brúk fyri at keypa vatndunkar og FM útvarp. Og keypa mat inn, so tú kanst klára teg. Til dømis makrel í tomat.
Tað eru nógv ár síðani, vit seinast máttu fyrihalda okkum til slíkt. Flest okkara hava ongantíð roynt tað, men tað skulu vit nú.
Vit mugu fyrireika okkum hvør sær og sum samfelag.
Tí hava vit sett á stovn eitt nýtt, óheft ráð fyri samfelagstrygd og tilbúgving (Ministerium for Samfundssikkerhed og Beredskab), sum fer at hava samskipandi ábyrgd av kreppustýring og matvørutrygd.
Í einum ófriðarligum heimi má Danmark vera betur fyrireikað.
* * *
Heimurin rundan um okkum er meira óvissur.
Ríkisfelagsskapurin millum Føroyar, Grønland og Danmark má broytast saman við tí veruleikanum, sum okkara trý fólkasløg liva í.
Eg eri fegin um, at henda broyting kann gerast í góðum og tøttum samstarvi og við virðing fyri sjálvstøðuga samleikanum hjá hvørjum landi.
Takk til norðuratlantisku limirnar her í Fólkatinginum fyri tykkara stóra arbeiði.
Takk til løgmann og formannin í grønlandsku stjórnini Naalakkersuisut fyri eitt virðingarfullt samstarv.
Vit hava eitt felags ynski um at økja um møguleikarnar hjá Føroyum og Grønlandi at hava sína egnu uttanríkispolitisku rødd.
Eitt aktuelt dømi er føroyska ynskið um at gerast óheftur limur í heimshandilsstovninum (WTO).
Hetta er púra skiljandi, men har eru løgfrøðiligir trupulleikar. Vit mugu royna at loysa teir.
Løgmaður og eg eru tí samd um at senda málið til nevndina, sum sambært heimastýrislógini kann loysa slíkar rættarligar ósemjur. Nevndin er ongantíð fyrr blivin brúkt í 76 ára søgu heimastýrislógarinnar.
Grønland er tað stóra arktiska landið í danska ríkinum, og tí er tað eisini rættiliga natúrligt, at Grønland skal hava ein serligan leiklut, tá Kongaríkið yvirtekur formansskapin í Arktiska ráðnum.
Tá fremmandar maktir vilja sundurskilja, førka vit okkum saman í danska ríkinum, men vit gera tað upp á ein nýggjan máta. Javnsett. Virðingarfult. Og vit tora at fara nýggjar leiðir.
* * *
Í dag eru tvey ár, sjey mánaðir og sjey dagar síðani Russland fór undir sína fullfíggjaðu innrás í Ukraina.
Eg eri errin av treiska og treytaleysa stuðlinum hjá Danmark til stríðið hjá Ukraina fyri frælsi.
Við søguliga breiðari undirtøku – í Fólkatinginum og hjá fólkinum – hava vit sett okkum á rættu síðu av søguni. Við at viðurkenna, at frælsi ikki var givið okkum fyri ævir.
Frælsi hevur sín prís. Og frælsi er eisini í okkara tíð ein ævigur bardagi.
Um hasin bardagin ikki eydnast, so óttist eg inniliga, at framtíðin hjá Evropa verður sera, sera myrk.
Tað er tí, vit mugu eydnast.

Eg eri errin av evropeiska og transatlantiska samanhaldinum ímóti áganginum hjá Russlandi.
ES er sterkari enn áðrenn kríggið. NATO er sterkari enn áðrenn kríggið.
Men eg eri ósamd í teirri heldur ástøðiligu tilgongdini, sum dominerar partar av almenna orðaskiftinum.
Reyðar linjur verða teknaðar upp. Vápn verða latin, men mugu ikki brúkast í fullari sjálvverju, sum veruliga kann trýsta Russland aftur.
Og tey vápnini, sum eru neyðug at vinna kríggið, eru enn ikki í Ukraina.
Men eingin kann vinna kríggj við einum armi á rygginum.
Alt ov leingi hava vit tosað um, at Ukraina ikki má tapa kríggið, men er tað nóg mikið fyri tey okkara, sum ynskja frælsi?
Ukrainar berjast ein næstan ótolandi bardaga, ikki bert fyri sítt egna flagg, sítt egna land, sítt egna lív.
Tey berjast eisini fyri okkara frælsi.
Tað er bert ein møguligur endi av krígnum.
Ukraina má vinna.
Fyri at eydnast hava ukrainar tørv á okkara flogførum, okkara vápnum, okkara hernaðarligu vitan, okkara íløgum í ukrainska verjuídnaðin og okkara fíggjarliga stuðli.
Um vit ikki geva tað, vit kunnu, so svíkja vit í okkara ábyrgd.
Tí fer danski stuðulin til Ukraina at halda fram, so leingi sum tørvur er á honum.
Tað er eingin orsøk at trúgva, at Russland fer at steðga við Ukraina. Russland fer at halda fram, inntil tey sjálv verða steðgað.
Vit brúka nú meira enn 2 prosent av BNP til verju og trygd.
Lat meg vera erliga og siga tað beinleiðis; Vit fáa tørv á meira. Fyri at kunna verja okkum sjálvi. Stuðla til verjuna av okkara sameindu í NATO.
Vit mugu øll her í Fólkatinginum vera til reiðar at raðfesta og gjalda rokningina, eisini í framtíðini.
Í 2025 tekur Danmark við formansskapinum í ES.
Her verður kríggið í Ukraina sjálvandi tað týdningarmesta, saman við arbeiðinum at styrkja evropeiska verjuídnaðin, men tað verður eisini nógv annað at taka sær av.
Grønt orkuskifti, kappingarførið hjá ES og tørvurin at styrkja uttara mørkini hjá ES.
Vit mugu hava greiðu á, hvussu nógv fólk koma higar og steðga ómenniskjaliga handlingum hjá menniskjasmuglarum.
Tað er tørvur á einum sterkum Evropa, sum tekur ábyrgd av síni egnu trygd.
Næsta ár fær Danmark eisini pláss í Trygdarráðnum hjá ST.
Her mugu vit arbeiða fyri at finna loysnir upp á heimsins tíverri alt ov mongu stríð og verja tey mongu sivilu offrini.
Tað er eisini galdandi í Miðeystri.
Beint nú hyggja vit við stúran at menningini í Libanon.
Uttanríkismálaráðið hevur heitt á allar danskarar um at fara úr landinum og fylgir støðuni gjølla.
Mánadagin er eitt ár síðani vit vaknaðu til eitt av ringastu yvirgangsálopunum í heimssøguni.

Hamas neyðtók, píndi og drap.
Størsta talið av jødum síðan Holocaust vórðu dripnir eftir bara fáum tímum. Fleiri hundrað vórðu burturflutt, og nógv verða enn hildin sum gíslar av Hamas.
Sama hvat mann heldur um aftursvarið hjá Ísrael, eiga øll at krevja, at gíslarnir verða leyslatnir. Tey hava einki annað uppiborið enn at verða sameind við familjur sínar.
Tey hava ongan lut í stríðnum. Tey eru ósek.
Tað eru eisini tey túsundavís av palestinskum børnum, sum antin eru dripin í Gaza. Send avstað sum flóttar. Horvin frá foreldrunum. Ella sum líða av bráðneyðugum mattroti og eru í vanda fyri polio og aðrar álvarsligar sjúkur.
Menniskjaliga líðingin er næstan óhugsandi, og vápnahvíld er framvegis avgerandi.
Stríðið í Miðeystri er ólukkuligt, og tíverri elvir tað eisini til polarisering, ósemjur og sundurlyndi í okkara egna landi.
Men ófriður eigur ikki at vera í okkara samfelag, og vit mugu hava viljan at sameinast um tann dupulta boðskapin: At Ísrael sjálvandi hevur rætt til at vera til í friði og frælsi, og at palestinensar hava júst sama rætt.
Tað krevur fleiri ting.
Fyrst at Hamas steðgar yvirganginum og setur seg sjálvt úr gildi. Ein palestinskur statur kann ikki grundast á ein yvirgangsfelagsskap sum Hamas.
Fyri tað næsta, at Ísrael steðgar teimum ólógligu og órímiligu búsetingunum, sum einans virka til at økja um stríðið.
Einaferð var skynsemi og saklighet á báðum síðum. Síðani tá hava ytru veingirnir tikið yvir og elvt til skaða fyri tað mesta. Ja, til alt.
Og tí mugu vit fyri tað triðja leggja nógv meira trýst á partarnar, so teir eisini skilja, at ein tvey-statsloysn er einasta langtíðar og varandi svarið.
Ístaðin fyri at fólk í Danmark og aðrastaðni fara í tvíningar í einari støðu, sum vit sjáldan hava sæð, áttu vit heldur at staðið saman um hesi krøvini.
Men tíverri eru tað ikki bara tey hørðu orðini, sum stríðið hevur havt við sær.
Fyri summi er tað eisini handling. Ein ungur maður er ákærdur sambært yvirgangs-paragraffini fyri at fyrireika eitt brenniálop á eina jødiska kvinnu her í Danmark.
Eg eri ræðslusligin av, at jødahatrið er vaksið.
Lyftið, vit góvu danskum jødum eftir seinna heimsbardaga. fer altíð at vera galdandi.
Hetta fevnir eisini um ein greiðan stuðul fyri, at Ísrael sjálvandi hevur rætt til at verja seg sjálvt, eins og øll onnur lond gera.
Men merkir hetta, at Ísrael hevur rætt til at gera hvat sum helst? Nei.
Tey mugu halda krígslógirnar, og tey mugu gera meira – nógv meira – fyri at taka sær av vanligu fólkinum, sjálvt um tað er trupult, tá Hamas goymir seg aftan fyri kvinnur og børn.
Niels Bohr segði, at tað øvugta av sannleika er einfaldi, og at tað satt at siga einki einfalt er um stríðið í Miðeystri.
* * *
Einfalt er tað ikki nógv, ið er longur, men vit kunnu vinna á avbjóðingunum, um vit vilja.
Júst tað er uppgávan hjá okkum her í Fólkatinginum. At arbeiða fyri at loysa trupulleikarnar, sum okkara fólk, land og heimur hava.
Síðani seinastu fólkatingssetu hava vit fingið ein nýggjan kong og eina nýggja drotning.

Arbeiðsfjøldin er á tí hægsta nakrantíð.
Og fyri fyrstu ferð gjørt ein veruligan og bindandi grønan ættarliðssáttmála fyri framtíðarinnar náttúru og framtíðar danskar.
Í stjórnini gleða vit okkum til framhaldandi at taka ábyrgdina og, saman við øllum flokkum her í Fólkatinginum, at taka okkum av og menna okkara undurfulla land í dag og í morgin.
Ikki minst at taka okkum betur av teimum, ið tørva tað mest.
Tá kanska heimsins besta vælferðarsamfelag ikki klárar at lofta fólki, sum veruliga stríðast, so vóni eg, at vit øll í hesum salinum kunnu semjast um at gera okkum enn meira ómak.
Og skuldi tað verið ein, sum situr og hugsar: Hví brúkar ein forsætisráðharri so nógva tíð til sosialpolitikk í eini setanarrøðu – lat meg so stutt siga her at enda.
Tað er helst einki einstakt politikkøki, sum sigur okkum meira um eitt samfelag og íbúgvar tess, enn førdi sosialpolitikkurin.
Hvussu vit hitta onnur fólk er ein spegil av, hvørji vit eru.
Eg byrjaði røðu mína við at hyggja 139 ár aftur í tíð. Um uppslitna lívið og óvirðiligu viðferðina hjá Stine Bødker.
Tá eftirkomarar okkara um 139 ár hyggja at okkara máta at fara við øðrum fólki. Hvat fara tey tá at síggja?
Lat okkum stremba eftir at vera besta útgávan av okkum sjálvum.
DANMARK LIVI. Hurra! Hurra! Hurra!